# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Pakkalagna í hosnatráði

Ólavsøkupakkin tykist ikki at hava breiða og sterka undirtøku í almenninginum. Sami pakki er neyvan betur umtóktur millum samgongufólk á tingi. Lagna pakkans tykist tí hanga í einfaldum hosnatráð.

Í gjár kom Samtak út við hvøsssum atfinningum. Samtak er ikki hvør sum helst men ein samstarvsfelagskapur, sum umboðar verkafólk í túsundatali á sjógvi og landi. Hartil kemur, at ein stórur partur av limaskaranum hjá Samtaki má haldast at vera Javnaðarfloksins kjarnuveljarar, er pakkin tí ein politiskur trupulleiki hjá flokkinum. Tað er eisini nógv, sum bendir á, at í Javnaðarflokinum er vaksandi mótstøða ímóti sosiala partinum av pakkanum, so pakkaloysinin verður eingin dansur á rósum hjá fíggjarmálaráðharanum og øðrum av Javnaðarfloksins oddafiskum.

Atfinningarnar hjá Samtaki snúgva seg um hetta, at støðan hjá teimum veikastu pensionistunum versnar uppaftur meira, um pakkin verður framdur óbroyttur. Samtak vísir á, at fyritíðarpensjonistar verða raktir, tí mótroknað skal í pensjónini frá fyrstu krónu, hóast pensjónin er eitt endurgjald fyri mistan arbeiðsførleika. Í dag kann ein fyritíðarpensjónistur forvinna uml 85.000 kr áðrenn tað verður mótroknað í fyritíðarpensjónini. Verður ætlaða broyting framd, fer fyritíðarpensjónisturin við inntøku á 85.000 kr at gerast einar 20.000 kr fátækari komandi ár. Víðari ger Samtak vart við, at ætlanin er at mótrokna frá fyrstu krónu, ið fólkapensjónistar hava í inntøku við síðuna av. Henda inntøka kann antin verða uppspard pensjón ella vanligt arbeiði. Hetta fer at raka ein bólk hart, sum frammanundan er illa fyri og hetta heldur Samtak verða vánaligan almannapolitikk.

Í gjár kom formaður Javnaðarfloksins á tingi, John Johannesen, við hvøssum atfinningum til ólavsøkupakkan og skírir partar av honum at vera í stríð við teir batar, sum vórðu framdir undir fyrru ABC samgonguni við tí endamáli at stimbra fyritíðarpensjónistin til eitt virkið lív á arbeiðsmarknaðinum. John Johannesen ger eisini vart við, at politiska viðgerðin als ikki er byrjað. Hetta er marghláttligt, tí vit hava fingið ta fatan, at pakkin er væl viðgjørdur í samgonguni. Nú skal ásannast, at formaðurin mest tosar um pensiónsaldurin, men atfinningar hansara snúgva seg eisini um spurningin um mótrokningina hjá fólka- og fyritíðarpensjonistum, sum ætlað er at fremja og sum fer at økja um stættamunin millum pensionistar. Hesar atfinningar eru álvarsamar, og tær benda á, at fótfólkið í flokki formansins hevur ilt við at góðtaka tann partin, sum snýr seg um viðurskiftini hjá fólkapensionsitum og fyritíðarpensionistum.

Pakkin líkist tí alt meira eini bumbu undir Javnaðarflokkinum og ABC 2 enn einum bleytum vakstrarpakka, sum skal bjarga okkum úr kreppuni og fáa gongd á aftur tey samfelagshjól, ið mala alt trekari og trekari fyri hvønn dag. Her liggur eitt stórt og tungt politiskt arbeiði fyri framman, um hesin pakki yvirhøvur nakrantíð skal verða borin út í Føroyum.

**Sosialurin**

## Ólavsøkukabarettin 2009

MAUD WANG HANSEN



»Kært barn hevur mong nøvn« - ella eisini snýr tað seg um, at eingin vil brúka tað navnið, barninum er givið. Ólavsøkuuppskotið juli 2009 er kallað ymiskt

• Ólavsøkupakkin
• Sparipakkin
• Kreppupakkin
• Sparitiltakið hjá landsstýrinum
• Vakstrarpakkin hjá landsstýrinum

Líkamikið, hvat navn verður sett á hetta uppskotið, so er andsøgn ímillum tað, samgongan sigur seg standa fyri, og tað, sum lagt er upp til í hesum uppskoti.

Í innganginum til uppskotið stendur, at: »Endamálið við hesum uppskoti er at leggja til brots, soleiðis at negativu avleiðingarnar av fíggjarkreppuni og øðrum umstøðum her heima gerast so smáar sum gjørligt.«

Eg meti, at tað mugu vera hesar sonevndu »aðrar umstøður«, sum gera seg galdandi, tí Føroya løgmaður segði greitt í útvarpinum, at talan als ikki er um nakran kreppupakka, men um ein vakstrarpakka. Fíggjarkreppan hevur ikki rakt okkum so meint, og tí er talan um eitt uppskot, sum skal fremja størri vøkstur í føroyska búskapinum.

Tó, um tú lesur ólavsøkuuppskotið ígjøgnum, so er fíggjarkreppan nevnd fleiri staðni sum orðsøk til tiltøkini, ið eru løgd fram.

Eg havi serliga heft meg við broytingarnar, sum raka pensjonistarnar. Her skulu sparast 25 mió. í 2010. M.a. skal landið spara pening við, at ein fyritíðarpensjonistur, ið fær tillutað miðal ella hægstu fyritíðarpensjón, sum forvinnur sær pening við síðuna av, fær mótroknað 25% í pensjónini av hvørjari vunnari krónu. Hetta metir man politiskt fer at økja um áhugan hjá fyritíðarpensjonistum at forvinna sær pening við síðuna av pensjónini. Eg eri stórliga bangin fyri, at júst tað mótsatta fer at henda. Eg dugi als ikki at síggja motiverandi faktorin í, at tú fært minni burturúr at gera eitt eyka arbeiði.

Tá talan er um fólk við fyritíðarpensjón, er ofta talan um fólk, sum hava fingið onkra sjúku ella brek, ið ger, at tey ikki til fullnar eru arbeiðsfør longur. Fyri tey, sum orka, er tað umráðandi at hava okkurt at takast við, tí tíðin ofta fellur ov long. Tá er lagamanni at hava okkurt lønandi arbeiði nakrar tímar, hetta er oftast ikki hálønt arbeiði, men meira eina sosialiserandi faktorur.

Nú skulu so 25% takast av hvørjari krónu, og skal hetta mótroknast í pensjónini, sum fyri ein persón við miðal pensjón er minni enn 10.000 kr um mánaðin. Ofta eru útreiðslur tengdar at sjúkuni ella brekinum, og hesar kostnaðir skal pensjonisturin eisini gjalda av sínari pensjón. Oftast er tað fysioterapi, fótarøkt, onnur tillagað skipan í kostinum ella keyp av hjálpitólum, sum ger tað dýrari at liva. Pensjonistar skulu nú eisini gjalda størri part av sínum heilivági, og stuðulin til diabetikarar er minkaður niður í eina helvt.

Fyritíðarpensjonistar eru ofta ung fólk við børnum og húsarhaldi, og fleiri teirra hava sethúsalán ella skuld av ymiskum slag, sum ungar familjur vanliga hava. Munurin á einum fólkapensjonisti og einum fyritíðarpensjonisti eru árini, har ein hevur kunnað goldið sína skuld niður og tillagað seg til aldurdómin. Ein fyritíðarpensjonistur er ofta raktur av brádligari sjúku ella broytingum í lívinum, sum forða honum í at liva eitt vanligt lív.

Fólk við fyritíðarpensjón eru umframt nevndi málbólkur eisini fólk við skerdum arbeiðsførleika vegna menningartarn, sálarsjúku ella annað. Hesi arbeiða vanliga á vardum verkstøðum kring landið, hjá ALV ella í øðrum tillagaðum vardum størvum á rúmliga arbeiðsmarknaðinum.

Eins og hjá støkum uppihaldarum er kostnaðurin hjá fólki við fyritíðarpensjón tann sami fyri húsarhald og børn, sum hann er fyri hjún. Tann eina lønin ella tann skerda lønin/pensjónin skal bera allar útreiðslur til húsarhaldið, so sum oljuavgjald, sjúkrakassa, kringvarpsgjald, tryggingar og ikki minst kostnaðin á matvørum, sum er ovurstórur á allari vanligari vøru, so sum breyði, mjólk og døgurðamati.

Afturat hesum kemur so vakstrarpakkin við sínum stimbrandi inntrivum, m.a. mótroknan av fyrst vunnu krónu á 25 %, lækkaður rentustuðul, lækkaður studningur hjá heimabúgvandi børnum yvir 18 ár, umframt alt tað, sum longu er framt av broytingum í almennu veitingunum.

Hetta skal til fyri at vit kunnu »halda hjólini malandi«, stendur í ólavsøkuuppskotinum.

Hvørji hjól skulu vit halda malandi?

Eru tað ovurnýtsluhjólini hjá teimum ríku, hjólini, sum skulu tryggja undirsjóvartunnlar kring landið, ella hjólini, sum loyva skattligum fyrimunum hjá teimum fáu, sum eingin torir at støðga.

Eg skilji als ikki, hví tað eru tey fáu og tey veiku, ið skulu halda hesi hjól malandi!

Eg fari at heita á samgonguna um antin at geva eina samanhangandi frágreiðing um, hví tit raðfesta, sum tit gera, ella at leggja frá tykkum, tí fyri mær síggjast eingi av tykkara stevnumiðum aftur í hesum uppskoti.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.